fólk. Hannefía helt, at tey gomlu trivust. Tað var nógva staðni, tey kundu seta seg, og tey kundu spáka í friði og náðum fyri bilum. Hetta var ikki júst møguleikar, tey høvdu í barakkunum við landssjúkrahúsið meira enn 40 ár seinni.

Seinast í fimtiáriunum fóru tey at gera seg til reiðar at flyta úr Hoydølum, nú talið á sjúklingum fækkaðist. Barakkirnar vóru bert ein fyribilsloysn. Tuberklastøðin flutti fyrst, og skipsmenn og onnur fóru út hagar til kanningar. Tað eru longu fleiri ár síðan hesar kanningar hildu uppat. Hildið var at nú var vandin við kanningini størri enn av tuberklunum sjálvum.

Tað var skjótt, at tey bert høvdu eina stovu standandi at taka ímóti tuberklasjúklingum. Og kom onkur var støðgurin sjáldan langur við tí heilivági, sum fanst.




## Børn á sanatoriinum

Á frímerkinum saman við Magnussen er eisini mynd av einum barni sum ímynd av eini orsøkin fyri basingini av tuberklum, nevniliga koppseting av øllum frískum børnum.

Men børn høvdu eisini sína sjúkrasøgu. Ein av tuberklasøgunum í FF-blaðnum var um børn á sanatoriinum. Henda frásøgnin vísir beinleiðis til hjásettu myndina, sum er frá 1940.

Tann yngsta á myndini nr. 29, er Ólfríða Niclassen f. Hansen, úr Gøtugjógv. Hon er fødd í 1929 og var 11 ára gomul tá. Hon er systir nr. 26, Hannefía, sum var 14 ár. Ólfríða var fyrst innløgd tríggjar mánaðir á hospitalinum og síðan 8 mánaðir á sanatoriinum. Her varð hon eisini "pustað", sum nærum var einasta viðgerð, sum tá var fyri tuberklar. Hetta varð gjørt á tann hátt, at luft varð blást inn í sjúka lunga, sum so varð lagt stilt. Hetta skuldi so gjørt tað skjótari hjá lunganum at lekjast. Henda viðgerðin mátti so endurtakast regluliga. Eftir at vera heimsloppin gekk Ólfríða til pustingar í hálvtannað ár.



*Her sæst Solveig á Sanatoriinum saman við einum drongi, sum eisini var innlagdur. Hvør man hann vera?*

Ólfríða fekk longu sum smágenta sæð álvaran í tuberklasjúkuni. Tær lógu fýra á eini stovu. Allar hinar tríggjar doyðu. Eyðolfur Mikkelsen úr Havn, nr. 25 á myndini, var 14 ár, tá myndin var tikin. Men hann var bert 11 ár, tá hann varð innlagdur fyrstu ferð í 1937. Hann fór seinni niður og varð opereraður, og ikki fyrr enn í 1946 kundi hann siga seg vera frískan.

Ein onnur søga um børn er, tá mamman mátti innleggjast. Ein kona, ættað úr Rituvík, hevur greitt frá, at mamma hennara var innløgd í seks ár frá seks børnum. Hendan konan var tvey ár tá, og hon varð send til ætt í Oyndarfirði. Hon varð koyrd við bili til Fuglafjarðar. Hagar kom skyldmaðurin úr Oyndarfirði, setti hana í ein leyp, og so um Skarðið til Oyndarfjarðar.

## Søgan um Lillu

Hendan søgan skal tó serliga snúgva seg um Johannu Poulinu Johannesen, vanliga kallað Lilla, úr Vestmanna. Hetta er ein søga, sum byrjar í 1935/36, tá Lilla var 13 ára gomul. Hon var dóttir Jóhonnu og Poul Johannes Johannesen. Tey vóru fimm systkjin: Bina, Gunhild, Lilla, Gimme og Solveig.

Í 1935 hendir tað, at Gunhild gerst sjúk 15 ára gomul. Tað tyktist at vera krím, sum hon ikki slapp frá. Pápin fór so til Havnar við henni, og tað vísti seg, at hon hevði tuberklar.

Hon varð so beinanvegin løgd inn á sanatoriið. Samstundis vísti tað seg, at tvær av systrunum, Lilla og Solveig, eisini vóru smittaðar. Tá var Solveig 9 ára gomul, og tað er hon, sum er keldan til hesa frásøgn. Solveig varð fyrst innløgd á hospitalið eina stutta tíð, og her helt hon jól í 1935. Her minnist hon Systir Elsu og Systir Ingeborg.

Síðan fór hon á sanatoriið saman við Lillu. Tískil vóru tær tríggjar systrar innlagdar í senn. Av starvsfólkunum her minnist hon serliga Miu Johannesen, nr. 22 á myndini. Gunhild, sum var tann sjúkasta, doyði 1. juli 1936, og Solveig minnist, at ein av Tvøroyri doyði samstundis. Lilla kom í fyrsta umfari fyri seg aftur og slapp heim aftur til Vestmanna. Men hon skuldi tó javnan til kanningar í Havn. Eina ferð hon hevði verið í Havn, fekk hon so ringan túr norður aftur til Vestmannar, hetta var langt áðrenn tað var koyrandi, at hon fekk krím og tuberklarnir brutu fram aftur. Hon varð so innløgd aftur, og hevur vist verið heima ímillum. Tað er í hesum sambandi, at hon er komin við á myndina frá 1940. Men hon doyði so 10. august 1941, júst ikki fylt 19 ár. Tey hjá Poul Johannesi vóru grannar hjá Jákupi í Gerðinum, millum annað kendur sum sємingsmaður, og Jákup minnist, at hon plagdi at ganga inn til teirra at læra hann bókstavirnar, áðrenn hann fór í skúla. Hetta bendir so á, at tey ikki hava ræðst tuberklarnar, sum ofta var tá.

## Trý børn á sanatoriinum

Tað gjørdist tískil bert Solveig, sum kom fyri seg aftur, og er hon nú 81 ára gomul. Hon var innløgd tilsamans eitt ár. Hon var so tikin úr skúlanum, men í Hoydølum var eingin skúlagongd fyri tey børn, sum vóru har. Tey vóru trý børn tilsamans, tvey sum vóru 10 ár og so Lilla, sum var 13. Tey trý hugnaðu sær saman og spældu sum børn gera. Solveig minnist einki til, at tey keddu seg. Solveig hevði so eisini systrarnar at vera saman við, og hon vitjaði javnan Gunhild, sum fyri ein stóran part lá í seingini. Hetta árið, Solveig var innløgd, slapp hon ikki heim nakrantíð. Tey máttu heldur ikki fara av sanatoriuøkinum, tískil heldur ikki til Havnar. Men tær fingu javnan vitjan av foreldrum og systkjum úr Vestmanna.

Solveig minnist væl læknan, Vilhelm Magnussen, sum kom á sanatoriið júst í 1936, og hon minnist eisini hansara undanmann dr. Lynge.

Ein partur av viðgerðini fyri tuberklar var at geva sjúklingunum góðan mat. Men Solveig minnist, at hon hevði ongan serligan matarlyst, so hesum fekk hon ikki stóra gleði burturúr. Men annars var tað frítt og gott at vera har. Solveig búði í Nýggja Húsinum, har teir frægaru av sjúklingunum búðu, meðan teir, sum vóru verri fyri, búðu í Gamla Húsinum. Her lá Gunhild eisini. Hon doyði so í 1936, men Solveig slapp ikki við til jarðarferðina. Solveig slapp heim til jóla í 1936, og hon minnist, at hon fór heim til Vestmanna við Smyrli. Tá fór hon beinleiðis í sama klassa, sum hon fór úr, og hon kláraði eins væl og hini hóast fráveruna. Tað var sjálvsagt hart hjá foreldrunum at missa tvær døtur á hendan hátt, og tað var ikki minni hart hjá mammuni, at Poul Johannes doyði longu í 1944, 53 ára gamal.

***Hendan myndin er tikin í 1940, og tey sum eru á myndini eru hesi:***

*__1__. David Andreassen, Sørvágur.*
*__2__. Dánjal Jákup Hansen, Norðoyri*
*__3__. Marin Petersen, Mikladalur*
*__4__. Niels Joensen, Hvannasund*
*__5__. Sissal Joensen, Skopun*
*__6__. Niclas í Lon, Miðvágur*
*__7__. Ove Eklund, Havn*
*__8__. Emmy Olsen, Vestmanna*
*__9__. Jana Hansen, Haldarsvík*
*__10__. Olga Berg, Hvalba.*
*__11__. Alma Nielsen, Heiðarnar*
*__12__. Alexander Dimon av Tvøroyri, búði í Lopra.*
*__13__. Dagmar Jacobsen, Sørvágur*
*__14__. Dorthea Joensen, Eiði*
*__15__. Anna Kristoffersen, Vestmanna*
*__16__. Poulina Abrahamsen, Mykines*
*__17__. Poulina Hansen, Klaksvík.*
*__18__. Johannes Johannesen, Oyndarfjørð*
*__19__. Christian Hammer, Toftir*
*__20__. Evald Joensen, Tórshavn*
*__21__. Clementina Johannesen, starvsfólk*
*__22__. Mia Johannesen, starvsfólk.*
*__23__. Erik Johannesen, Vestmanna.*
*__24__. Johanna Poulina Johannesen, Lilla, Vestmanna.*
*__25__. Eyðolfur Mikkelsen, Havn*
*__26__. Hannefía Hansen, Gøtugjógv*
*__27__. Nicodemus Rasmussen, Brimsvík Strendur*
*__28__. Johan Joensen, Kollafjørð.*
*__29__. Ólfríða Hansen, Gøtugjógv.*
*__30__. Margretha Poulsen, Havn*

**Komandi partur**

Í komandi parti fara vit at byrja eina røð við frásøgnum hjá Johan Norðfoss í Havn. Hann minnist væl til og dugur væl at greiða frá, so hetta kunnu okkara lesarar gleða seg til. Eisini verður komið inn á frásagnir hjá pápa hansara Albert í Horni.

Sosialurin